# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg veit ikki, hvussu mangar demokratar eg vil hava í stjórnina, men í hvussu er meiri enn ein*

*John McCain*

# Ongland druknar



**Gloprarregn hevur elvt til vatnflóð nógvastaðni í Bretlandi. Minst fimm fólk eru deyð**

Tað hevur serliga regnað illa í landnyrðingspartinum av Onglandi og í Wales. Í Yorkshire, Shropshire, Herefordshire og Worcestershire hevur verið vatnflóð, og í morgun ávaraðu myndugleikarnir framvegis um vatnflóð í 80 ymsum støðum.

Í Northumberland hevur vatnflóðin lagt stór øki undir, og ringast stendur til í býnum Morpeth, har umleið 1.000 hús standa undir í vatni. Løgreglan og bjargingarlið hava flutt fleiri hundrað fólk úr býnum, og teir lokalu myndugleikarnir siga, at vatnflóðin er tann ringasta í meiri enn 40 ár. Í fleiri førum noyddist bjargingartænastan at brúka tyrlu ella bát fyri at hjálpa fólki úr húsunum.

Bretsku myndugleikarnir siga, at fimm fólk eru deyð í illveðrinum.

*Í býnum Morpeth er vatnflóðin tann ringasta í 40 ár*

*Mynd: Polfoto*

# Ike hóttir oljupallarnar í Meksikoflógvanum



*Hesin pallurin hjá oljufelagnum Chevron er ein av teimum nógvu oljupallunum í Meksikoflógvanum*

*Mynd: Polfoto*

**Amerikanski serfrøðingar siga, at tann tropiska ódnin Ike fer at raka oljupallarnar í Meksikoflógvanum**

Ike hevur ment seg nógv og bleiv í gjár skrásett sum ein ódn á fjórða stigi. Tað er tað næstovasta stigið á listanum, sum amerikanski veðurstovnurin brúkar, og í hvirlunum var vindferðin upp í 215 kilometrar um tíman.

Sambært veðurmonnunum fer Ike inn í Meksikoflógvan. Vanliga menna ódnirnar seg, tá tær koma út yvir opið hav, men summir veðurmenn halda, at Ike er so mikið hørð longu nú, at hon fer kanska at vikna, tá hon fer tvørtur um Kuba og út í flógvan. Aðrir serfrøðingar vænta, at Ike verður framvegis ein av teimum ringu ódnunum, tá hon kemur út í Meksikoflógva, og at hon kann hótta teir nógvu oljupallarnar har.

Umleið ein fjórðoingur av amerikonsku oljuframleiðsluni er í økinum í og kring Meksikoflógvan. Fleiri oljufeløg tóku fólkið av fleiri pallum, tá ódnin Gustav herjaði fyri átta døgum síðani, og tey flestu hava mannað pallarnar aftur nú. Tó ikki øll. Shell Oil Co. boðaði í gjár frá, at felagið hevði gjørt av at bíða við at senda fólkið aftur á pallarnar, nú veðurmenninir aftur boða frá ódn í flógvanum.

# Hava brúkt 10 milliónir til at leita eftir Madeleine

**-Vit hava brúkt nógvar pengar til at leita eftir henni, men eitt barn hevur ongan prís, sigur Kate McCann**

Gerry og Kate McCann hava framvegis vón um at finna Madeleine aftur á lívi, hóast eingin hevur sæð hana ella hoyrt frá henni, síðani hon hvarv í Portugal tann 3. mai í fjør.

- Vit vóna at finna hana á lívi, men er hon deyð, vilja vit hava tað at vita, sigur Kate McCann við bretska blaðið Daily Mirror. Hon vísir á, at tær flestu metingarnar siga, at Madeleine er á lívi, og at tað er einki í løgreglufrágreiðingunum, sum bendir á, at nakað álvarssamt skal vera hent gentuni.

Í samrøðuni við Daily Mirror avdúka Gerry og Kate McCann, at tey hava brúkt næstan 10 milliónir krónur til leitingina eftir Madeleine.

- Tað eru nógvir pengar, men eitt barn hevur ongan prís, sigur Kate McCann við blaðið.



*Madeleine McCann hvarv 3. mai í fjør*

*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### Nógvar milliónir sóu McCain og Obama

Amerikanska forsetavalstríðið er eftir øllum at døma gott sjónvarpstilfar. Í hvussu er vísa hyggjarakanningar, at 38,3 milliónir amerikanarar sótu framman fyri sjónvarpinum, tá Barrack Obama helt røðu á landsfundinum hjá demokratunum, og at 38,9 milliónir fólk sóu John McCain halda røðu á landsfundinum hjá republikanarunum. Á hesum fundi helt Sarah Palin, varaforsetaevni, sína fyrstu røðu fyri amerikanska almenninginum, og hana sóu 37,2 milliónir amerikanarar.

Hóast McCain sostatt hevði heldur fleiri hyggjarar enn Obama, so benda meiningakanningarnar framvegis á, at Obama stendur heldur sterkari ímillum veljararnar. Á landsfundinum segði McCain, at tað er ikki so avgerandi, hvør vinnur meiningakanningarnar. Tað avgerandi er, hvør vinnur tann 4. novembur, segði hann.

### Bush troyttur

Tann kendi amerikanski tíðindamaðurin og rithøvundurin Bob Woodward skrivar í einari nýggjari bók, at George W. Bush, forseti, tykist vera ein troyttur maður eftir næstan átta ár í Hvítu Húsunum. Í bókini, sum Woodward hevur skrivað út frá samrøðum við 150 leiðandi fólk í stjórnarumsitingini, fregnartænastuni og herleiðsluni, er niðurstøðan, at forsetin var ivandi og fjarur og aftraði seg við at taka nakra avgerð, tá ófriðurin vant upp á seg í Irak. Ein onnur niðurstøða er, at Bush hevur sjáldan sagt allan sannleikan um Irak og amerikonsku luttøkuna har, tá hann hevur hildið røðu fyri amerikanska fólkinum, og at nógvir av hansara feløgum í republikanska flokkinum hava ikki álit á honum.

Bob Woodward gjørdist heimskendur, tá hann og starvsfelagin avdúkaðu Watergate-gøluna, sum noyddi Richard Nixon, forseta at leggja frá sær.